# Seyðauppboðssøla til frama fyri Stakkin

**Leygadagin var skipað fyri uppboðssølu til frama fyri Stakkin**

UPPBOÐSSØLA

*Sólrun Hansen & Anja Brekkstein, praktikantar*

Nógv bygdafólk ymsastaðni frá høvdu leygardagin leitað sær til Tjørnuvíkar, har vælumtókta seyðauppboðssølan fór fram. Tað var Staksnevndin, ið stóð fyri hesari seyðauppboðssølu, ið hevur verið afturvendandi tiltak næstan hvørt ár síðani Staksnevndin varð skipað. Størsti veðrurin vigaði heili 87 pund, og varð seldur fyri 7.000 krónur. Tilsamans komu umleið 78.000 krónur inn, og fer tað alt til ábøtur á Stakkinum.

Staksnevndin hevur næstan hvørt ár skipað fyri eini tílíkari seyðauppboðssølu, men næsta ár fyllur Stakkurin 30 ár, og tá verður ongin uppboðssøla. Tað er bert annað hvørt ár, at seyður gongur úti á Stakkinum, og næsta ár verða tað so lundar.





*Leygardagin vóru tjørnuvíkingar úti á Stakkinum. Seinni um dagin varð skipað fyri uppboðssølu til frama fyri viðlíkahald av Stakkinum. Inn komu tilsamans um 78.000*

*Mynd: J. E. á Løgmansbø*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Um morgunin upp í stívt andøvsgul av útsynningi og regn, men frá um middagsleitið lot av útnyrðingi ella av ymsum ættum og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og vestri og regn eitt skifti, annars mjørki í støðum. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, seinni hækkar hann upp í útnyrðing. Leygardagin yvirhøvur turt og sólglottar, men sunnudagin ælingur. Hitin millum 7 og 11 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 4 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | 18 |
| Halifax | 20 |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 18 |
| Tromsø | 7 |
| Bergen | 12 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 11 |
| Keypmannah. | 12 |
| Helsinki | 10 |
| Moskva | 8 |
| Berlin | 6 |
| Warzawa | 10 |
| Kiev | 7 |
| Bukarest | 17 |
| Paris | 15 |
| Madrid | 18 |
| Róm | 21 |
| Malorca | 22 |
| Athen | 29 |
| Malta | 27 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 27 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 28 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 26 |
| New York | 21 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 24 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 27 |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1012 hPa yvir Grønlandsfjørðinum fer í landsynning. Eitt hátrýst, 1030 hPa yvir Skotlandi fer í útsynning og viknar.




Lágtrýstið eystan fyri Føroyar fer í landsynning og lágtrýstið yvir Grønlandsfjørðinum fer í landnyrðing. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósdagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 23/09 kl. 06[00]– 24/09 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 11,5°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: <0,1 mm – mált frá 23/09 kl. 06[00]– 24/09 kl. 06[00]
Avfallið higartil í september: 62,4 mm


Spf.
…hvør sigur at vit eru sum onnur?
HESTPRENT
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo

GEVIÐ BLÓÐ
BLÓÐBANKIN
Telefon 311397


## VESTFALLSKYRRINDI

21. sept.: Fullmáni
23. sept.: Mánin longst frá jørðini
29. sept.: Seinna kvarter
6. okt.: Tendring/Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25. sept | 09.53 | 22.11 | 08.53 | 21.11 | 09.08 | 21.26 | 11.53 | — | 00.35 | 12.53 | 08.08 | 20.26 | 07.08 | 19.26 | 10.08 | 22.26 | 11.08 | 23.26 | 09.38 | 21.56 | 10.53 | 23.11 |
| 26. sept | 10.30 | 22.51 | 09.30 | 21.51 | 09.45 | 22.06 | 00.11 | 12.30 | 01.11 | 13.30 | 08.45 | 21.06 | 07.45 | 20.06 | 10.45 | 23.06 | 11.45 | — | 10.15 | 22.36 | 11.30 | 23.51 |
| 27. sept | 11.12 | 23.34 | 10.12 | 22.34 | 10.27 | 22.49 | 00.51 | 13.12 | 01.51 | 14.12 | 09.27 | 21.49 | 08.27 | 20.49 | 11.27 | 23.49 | 00.06 | 12.27 | 10.57 | 23.19 | — | 12.12 |
| 28. sept | 11.57 | — | 10.57 | 23.34 | 11.12 | 23.49 | 01.34 | 13.57 | 02.34 | 14.57 | 10.12 | 22.49 | 09.12 | 21.49 | — | 12.12 | 00.49 | 13.12 | 11.42 | — | 00.34 | 12.57 |

5 707265 100036 >